# HEILSANIR



Hjartaliga takka vit øllum tykkum, sum á ymiskan hátt vóru við til at gera hjúnabandsdag okkara 29. des. 2003 ógloymandi.
**Rannvá, Dánjal Jákup, Sigurd og Signhild**



Vit seks í móðurbólkinum febr/mars 1990 takka hjartalig øllum, sum gleddu okkum og foreldur okkar á konfirmatiónsdegnum.
**Blíðar heilsanir Olga Kristina, Karl Martin, Bára, Jón, Gunnhild og Jan**



Vit takka hjartaliga øllum tykkum, sum á ymiskan hátt gleddu okkum á hjúnabandsdegnum tann 20. mars 2004. Takk fyri gávur, blómur og heilsanir. Ein serlig tøkk til tykkum, sum á ymiskan hátt hjálptu til,
**Nomi og Jónas á Stongum**




**Hey børnini á Svangaskarði**
Takk fyri ein vátan kanóntúr. Spell Bent ikki var við, tí hann elskar vatn.
**Heilsan Eileen, Olivia og Bodil**



**Góða fastir**
Hjartaliga tillukku við 21 ára føðingardegnum 23. mai. Tað verður gott at koma heim til tín í juni.
**Ynskir lítladiddan**



**Góða Rannvá**
Hjartaliga tillukku við próvnum. Góða eydnu.
**Ynskja mamma, pabba, Bjørg og Katrin Jóhanna**



**Góða elskaða Hildur**
Hjartaliga tillukku á 21 ára degnum 23. mai. Tað verður gott at sleppa at ferðast í summar.
**Ein, ið ætlar sær við**



**Góða Hildur**
Hjartaliga tillukku á 21 ára føðingardegnum 23. mai. Gud signi framtíð tína.
**Ynskja omma og abbi á Eiði**



**Góða fitta Bjørt**
Hjartaliga tillukku við føðingardegnum, ið er í dag. Omma og abbi eru so góð við teg og ynskja tær at tað besta í framtíðini.
**Omma og abbi í Hoyvík**



**Góða Rannvá**
Hjartaliga tillukku við 11 ára degnum. Vit gleða okkum til føðingardagin sunnudagin.
**Tino og Tutla**



**Góða fitta didda**
Tillukku við føðingardegnum í morgin. Takk fyri at tú ert so góð við okkum.
**Ynskja Ronja og beiggjarnir**



**Góða Hildur**
Hjartaliga tillukku við 21 ára degnum 23. mai. Alt tað besta í framtíðini.
**Ynskja vinir**



**Góða fittasta Bjørt**
Hjartaliga tillukku við 6 ára degnum, ið er í dag. 1.000 mussar og klemm frá
**Mammu, babba og Rebekku**



**Góða fitta Rannvá**
Vit ysnkja tær tillukku við 1 ára føðingardegnum 23. mai.
Vit elska teg.
**Heilsan omma, abbi og mostir í Skálabotni**

## Heilsanir

30,- kr. Sosialurin

**5 ferðir um vikuna**

### Gevið gætur

Bert heilsanir, skrivaðar á henda lepan og goldnar frammanundan við 30,- kr. fáa innivist í blaðnum. Til ber eisini at lata okkum lepan og gjald í avgreiðsluni á Argjavegi 26, millum kl. 8.00 og 16.00.

**Myndaheilsanir skulu vera okkum í hendi á miðdegi 2 dagar fyri útkomudag.** Viðmerkið annars niðanfyri, um heilsanin ynskist í blaðið ávísan dag.
❑ Týsd. ❑ Mikud. ❑ Hósd. ❑ Fríggjad. ❑Leygard.

Tekstur:.......................................................................
.......................................................................
.......................................................................
.......................................................................
.......................................................................

**Myndina aftur:** Minnist til at skriva navn og bústað aftanfyri á myndina og at leggja við ein frankeraðan brævbjálva við navni og bústaði.
Um neyðugt fyri arbeiðsgongdina, taka vit okkum rætt til at fáa heilsanina í blaðið annan dag, enn tann ynskta.

Sent hevur (skal fyllast út).
Navn: .......................................................................
Bústaður: ..................................................................
Bygd/býur: .................................... Tlf.: ................

Sendið lepan, mynd og gjald til:
**Sosialurin**
Postsmoga 76 •110 Tórshavn
Merkið bjálvan: »**Heilsanir**«



# TILTØK

## BRÚDLEYP

Leygardagin 19. mai giftast í Prestagarðinum í Lamba Gunn Johannesen, Runavík og John Dávid Joensen, Leirvík. Døgurði verður fyri innbodnum á Sjómansheiminum í Runavík. Eftir kl. 20.00 er opið hús heima hjá Lyon og Jórun, har øll eru hjartaliga vælkomin.

Leygardagin 5. juni kl. 16.00 giftast í Vesturkirkjuni Elsebeth Joensen, Fuglafjørður og Óttar á Lofti, Sandavágur. Veitsla verður fyri innbodnum á Hotel Føroyum kl. 19.30.

Leygardagin 5. juni kl. 11.00 giftast í Christianskirkjuni í Klaksvík Sonja Sólbjørg, Klaksvík og Jonhard Danielsen, Søldarfjørður. Veitslan verður hildin í Bygdarhúsinum í Leirvík. Tey, ið vilja gleða brúðarparið við at koma, verða vinarliga biðin um at siga frá áðrenn 22. mai á tlf. 442099, 441199 ella 455438.

Leygardagin 19. juni kl. 15.00 giftast á Býráðsskrivstovuni í Vági Malan Klakkstein og Alex Vilhelm. Vælkomst verður í VB-húsinum kl. 19.00. Tey, ið vilja gleða brúðarparið við at koma, verða vinarliga biðin um at siga frá á tlf. 374004, 269537 og 573006 áðrenn 28. mai.

Leygardagin 26. juni kl. 15.00 giftast í Vesturkirkjuni Sanna Poulsen og Jóan Pauli Joensen, Tórshavn. Veitslan verður hildin í B36-húsinum kl. 19.00. Tey, ið vilja gleða brúðarparið við atkoma, verða vinarliga biðin um at siga frá áðrenn 14. juni á tlf. 322669, 223769 ella 223027.

Leygardagin 26. juni kl. 14.00 giftast í Fríðrikskirkjuni Jannet Hanusardóttir, Nes og Pauli Højgaard, Rituvík. Veitslan verður í Bygdarhúsinum í Leirvík kl. 19.00. Tey, ið vilja gleða okkum við at koma, verða vinarliga biðin um at siga frá innan leygardagin 12. juni á tlf. 448169, 262057 ella 447805

Leygardagin 26. juni giftast Laila Haraldsen, Argir og Sámal av Reyni, Tórshavn. Vígslan verður í Ebenezer kl. 14.00. Veitslan verðu rhildin kl. 18.00 í Reyni Service, Vegurin Langi, Hoyvík. Tey, ið vilja gleða brúðarparið við at koma í brúdleyp, verða vinarliga biðin um at siga frá á tlf. 315829 ella 317899 ella senda ein teldupost til laila.haraldsen@kallnet.fo ella samal reyni@yahoo.dk áðrenn 5. juni.

Leygardagin 26. juni kl. 16.00 giftast Thora Petersen og Búi Holm í Bíggjar kirkju. Brúdleypið verður hildið í Norðradali kl. 19.00. Tey,ið vilja gleða okkum við at koma í brúdleyp, verða vinarliga biðin um at siga frá á tlf. 228742 ella 580832 innan 6. juni.

26. juni kl. 16.00 giftast í Skopunar kirkju Annika Ryggstein og Remi Nicolajsen. Vælkomst verður í Samljóð kl. 19.00. Tey, ið ynskja at gleða brúðarparið við at koma, verða biðin at siga frá innan 12. juni á tlf. 361955, 361047 ella 361779.

Leygardagin 26. juni kl. 15.00 giftast í Kollafjarðar kirkju Gudny Johannesen og Rodmund Magnussen á Signabø. Veitslan verður í bygdarhúsinum í Hósvík kl. 19.00. Tey, ið vilja gleða brúðarparið við at koma, verða vinarliga biðin um at siga frá áðrenn 14. juni á tlf. 421489, 421449 ella 421569.

Í samband við okkara brúdleyp og 50 ára føðingardag hjá Karl tann 29. juni, hevði tað glett okkum at sæð familju og vinir til døgurða í Sinding forsamlingshúsi fríggjadagin tann 2. juli kl. 18.00. Tey, ið vilja gleða okkum við at koma, verða vinarliga biðin um at siga frá áðrenn 20. juni á tlf. 0045 97136669.

10. juli kl. 16.00 giftast í Vesturkirkjuni Solina Joensen, Skopun og Hans Ib Jacobsen, Tórshavn. Veitslan verður í bygdarhúsinum í Hósvík kl. 19.00. Tey, ið vilja gleða okkum við at koma í brúdleyp, kunnu tekna seg á tlf. 255263 ella 320391 eftir kl. 19.00. Seinasta freist at tekna seg er 15. juni.

## SILVURBRÚDLEYP

23. juni hava Súsanna og Hjørleiv Hammer, Reynsgøta 25, Argir, verið gift í 25 ár. Silvurbrúdleypsveitsla verður hildin á Hotel Føroyum 26. juni kl. 19.00. Tey, ið vilja gleða silvurbrúðarparið við at koma í veitslu, verða vinarliga biðin um at siga frá á tlf. 317645 ella 361325 áðrenn 14. juni.

23. juni hava Petra og Hans Jørgin Nysted í Hvannasundi verið gift í 25 ár. Silvurbrúdleypsveitslan verður hildin á Hotel Norð 26. juni kl. 19.00. Tey, ið vilja gleða silvurbrúðarparið við at koma í veitslu, verða vinarliga biðin um at siga frá á tlf. 452105 áðrenn 14. juni.

**Gudstænastur**
**6. sunnudag eftir páskir**
*Havnar kirkja:* kl. 11, Jóannis Fonsdal
*Nólsoy:* kl. 12, Bjarni Bæk
*Vesturkirkjan:* kl. 11, Bergur D. Joensen
*Argir:* kl. 11 lestur
*kl. 14* Sunnudagsskúli ella útferð, um viðrar
*kl. 14* Familjugudstænasta, Bergur D. Joensen
*Skúvoy:* kl. 12, Sonja Klein
*Sandavágur:* kl. 11, altarg., Inga Poulsen Dam
*Sørvágur:* kl. 11, David Johannesen
*Kollafjørður:* kl. 11 altarg., Marjun Bæk
*Saksun:* kl. 11, Mogens T. Christensen
*Hósvík:* kl. 11, Martin R. Jacobsen
*Norðskála:* kl. 10.40 skriftamál, kl. 11 messa,
*kl. 17* Barnagudstænasta, Emil Olsen
*Hellurnar:* kl. 11 altarg., Uni Næs
*Gøta:* kl. 11, Martin R. Jacobsen
*Kirkja:* kl. 12,
*Hattarvík:* kl. 17, Elsa Funding
*Søldarfjørður:* kl. 11, Meinhard Bjartalíð
*Skála:* kl. 11, barnakórið, Jógvan Fríðriksson
*Árnafjørður:* kl. 11, altarg., Niels Pauli Danielsen
*Christianskirkjan:* kl. 11 lestur
*Haraldssund:* kl. 11, Hans Eiler Hammer
*Sandvík:* kl. 11,
*Hvalba:* kl. 12.30 Ólavur Rasmussen

**Missiónshúsið við Landavegin**
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli á vanligu støðunum, kl. 18 Møti við Jústines Poulsen.

**Meinigheitin í Hoyvík**
*uppi á Brekku 3*
Leygarkvøldið kl. 21 Bøn í býnum.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Evangel. møti v/ André og Mary, kl. 18 Útimøti á Vaglinum.
Mánakvøldið kl. 20 Bønarmøti.
Mikumorgun kl. 7 Bønarmøti.

**Frelsunarherurin, Tórsgøta 19**
Kvinnustevnan heldur fram við túri til Sandoy í dag kl. 9.15.
Sunnudagin kl. 11 Møti, major Thorgeir Nybo talar. Kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 15.30 Kvinnumøti. Kl. 18 Alment møti, major Marianne Nybo talar og ymiskar kvinnur luttaka.
Mánadag kl. 17 og 19 Skótamøtir.

**Meinigheitshúsið**
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti við Kurt Joensen frá SAT7, Fríða syngur.




**Hátrýstvaskarin!**







**Kring landið**
Vit hava ognað okkum ein hástrýstvaskara við trýsti, ið er 500 bar. Tá ið tað snýr seg um at reinsa bygningar, húsagrundir, tøk, tún, gólv og annað tílíkt, loysir tað seg at lata júst hendan sterka hástrýstvaskaran loysa uppgávuna. Tað ger heldur ikki mun, hvar í landinum arbeiðið skal gerast. Hann er lættur at flyta.

**Við veggin**
Vanliga hástrýstvask okkara við 500 bars trýsti og heitum ella køldum vatni megnar alla reingerð. Vanlig óhumska, gróður og leys máling fúka av sum einki. Er málingin føst, verður sandur eisini nýttur. Tá loysnar øll máling lættliga. Verður farið at loysa størri veikleikar í pussaðum betongi, verður sama viðgerð nýtt.

**Á takinum**
Tá ið tøk verða vaskað, nýta vit serligan takreinsara. Trygdin er í hásæti, og framleiðararnir hava eisini tryggjað, at eingin vandi er á ferð, tá ið asbesttøk verða vaskað. Serstøk verja er á takreinsaranum. Hon tryggjar, at takið verður vaskað væl og virðiliga, hóast tað ikki spruttar. Vatnið rennur niður í takrennuna.

**Ring 42 31 11**

SANDBLÁSING
VEGGJAREINSAN & TAKREINSAN

Spf. Sandblásing · 466 Ljósá · Telefaks 42 34 32 · sandblas@post.olivant.fo